# FUGLAFJØRÐUR

uppskot til nýggjan miðbý



65159

# 01

# //SKRÁSETING



01.1 - Málið
01.2 - Innleiðing

# MÁLIÐ



## 2042 - 2042

Upskotið arbeiðir fyri einum fólkavøkstri í býnum, sum er grundaður á at steðga fráflyting og eggja til tilflyting. Hetta verður gjørt við at gera býin dragandi.

Málið er at í 2042 skulu 2042 fólk búgva í Fuglafirði. Hetta er eitt framsøki mál at seta sær. Um tú roknar uppá hetta, so er hetta meira framsøki enn 2050 visjónin. Ikki tí at tað er nakað galið við henni, tvørturímóti. Tað er eitt tekin um kommunan ynskir at tað skal henda nakað.

Uppá góð 17 ár skal alt fyrireikingararbeiðið gerast og bústaðir byggjast  og fólk flyta inn. Tað tekur tíð og oftani tíð har lítið og einki hendur.





**MILLUM VØKUR FJØLL**
**HØG OG BRATTLEND ØLL,**
**MÓTI EYSTUROYAR FØGRU EYSTURSTROND**
**LIGGUR BYGDIN, IÐ**
**EG UM ALLA TÍÐ**
**VIL ELSKA, ER MÆR LAGAÐ LÍV OG OND.**

*- Ismar Joensen. Yrkt í 1939*

# INNLEIÐING

**Heimurin anno 2024**

Vit eru í eini rembingartíð. Heimssamfelagið er undir ógvusligari broyting sum krevur nýggja støðutakan til hvussu vit skulu innrætta okkara samfelag.

Vitlíkið (AI) er ein "disruptari" og spreingir verandi mørk bæði á arbeiðsmarknaðinum og í okkara daglidegi. Fíggjarkervið er merkt av nýggjum siðvenjum innan burðardygd og ringbúskap. COVID farsóttin hevur broytt arbeiðsmynstrið, vit kunnu røkkast í digitalum fundarhølum úr øllum heraðshornum. Umhvørvið er nú av álvara merkt av veðurlagsbroytingum og lívfrøðiligari margfeldiskreppu. Politikkur er merktur av stórum spenningum millum heimsstórveldini og talað verður um sosialt rættvísi, líkavirði og menniskjarættindi. Mentanaðarligar og demografiskar broytingar í samfemfelagnum bera í sær broyttan hugburð til virðir og normar, eitt ørðvísi, fjøltáttað familjumynstur og fólkaflyting frá bygd til bý.

**Fuglafjørður anno 2024**

Vinnan hevur síðan 60´ini ment seg støðugt til í dag at veita 1000 størv. Hetta eru fyritøkur, sum hava ment seg frá lítlum til í dag at vera altjóða vitanarfyritøkur. Her eru størv til ófaklærd-, faklærd-, til fólk við hægri útbúgvingum og granskarar.

Kambsdalur verður í skemti róptur "Silicone Kambsdal". Umframt miðnámsskúli eru her eisini hátknologiskar fyritøkur, við altjóða status og eitt prototypuverkstað, eitt sokallað Fab Lab. Tískil kann vinnulív, skúlaskapur, nýskapan, gransking og íverksetan ganga hond í hond og er samanberingin við Silicone Valley, tí ikki av órøttum.

í Fuglafirði búgva 1633 fólk, 100 færri kvinnur enn menn. Rákið sum vísir at tey yngru flyta til størri staðir sæðst eisini her. Tó so hevur Fuglafjørður eitt ríkt mentunarlív. Listin hevur eins stóran týdning fyri fuglfirðingar. Bygdin hevur fostrað fleiri listafólk, bæði innan myndlist, tónlist og ritlist.



**Fuglafjørður anno 2042**

Fuglafjørður verður staðurin har listmentanin og fiskivinnan eru dívmegin. Fuglafjørður verður fyri Føroyar sum Glasgow er fyri Skotland. Ein transformeraður tungíðnaðarbýur til ein vitanartungan vinnu og lestrarbý við høvuðsdenti á tí kreativa og listini.

Eitt umhvørvið við list, íverksetan, háteknologi og fjøltáttaðari fiskivinnu er ikki bert dragandi fyri tey ungu í Fuglafirði, sum eru uppvaksin í hesum umhvørvinum, men er eisini dragandi fyri so nógv onnur ung, aðrastaðni í Føroyum og aðrastaðni í heiminum. Harumframt hetta verður Fuglafjørður ein nútímans býur sum byggir á holistisk burðardygg grundsjónarmið, sum taka atlit at socialum trivnaði, náttúruverju og tilvitaðum forbrúki.

Miðbýurin í Fuglafirði verður ein livandi miðbýur. Fólkatættleikin um miðstaðin ger, at har er altíð fólk at síggja á gøtunum, á kaféum og í matstovum. Samværi millum vinnuna og listina hava skapt nýggjar vinnugreinar og fleiri nýggj arbeiðspláss. Nýggja bústaðarøkið Havoy er eitt umtókt stað at búgva. Har hevur tú tað besta "of both worlds" tú hevur títt egna hús, privata útiøkið, grønt umhvørvið og kortini býrt tú mitt í býnum við ríkum møguleikum fyri felagslívi.

# Havoy



**Havoy - nýtt bústaðarøki**

Navnið Havoy - Mong nøvn vóru havd á loftið til oynna, men, tá navnið Havoy kom upp, klingaði sangurin hjá Kim Larsen í oyrunum. "Jeg bor til leje på Havoyije" og tankarnir fóru til skald og trubadurar í Fuglafirði, sum so hegnisliga spæla við orðum og fáa hetta humoristiska, eitt sindur skeiva fuglafjarða lyndi fram í skaldskapin.

Havoy verður eitt norðuratlantiskt Hawaii, við verju fyri stormum frá atlantshavinum. Verjugarður og salttolnar plantur, runnar og trø, skapa eitt veðurgott frístað fyri íbúgvarnar. Túnini eru bilfrí so børn og vaksin kunnu spæla og flyta seg frítt og trygt ímillum býlingar og tún. Felagsskapur og samanhald er ein sjálvfylgja. Lívfrøðiliga margfeldi, tilvitað nýtsla og sosiali trivanðurin eru grundasteinar undir Havoy.

Verjugarður og bátabrúgvar - Havoy hevur verjugarð úr gróti móti havsíðuni og timburbrúgvar ímóti fjørðusíðuni.

Lívfrøðiliga margfeldi - Inntrivið sum verður gjørt í bergið fyri at fáa tilfar til vega at byggja oynna við, meta vit er minni, enn tey inntrivini sum nú vera gjørd við siðbundnu útstykkingunum, har meir og meir hagalendi verður tikið til bústaðabygging. Vit mótrokna tøkuna av livistøðum á havbotninum, við at skapa nýggj livistøð frammvið verjugarðinum. Verjugarðurin er ikki beinur. Við fyrimynd í nesinum hava vit skapt verjugarðin við tveimum nesum. Ymiskleikin í skapinum, yvirflatuni og eksponeringini førir lívmargfeldi við sær.

Viðv. hædd á verjugarði - Ein avleiðing av veðurlagsbroytingunum verður at vatnstøðan hækkar. Vísindafólk eru ikki í iva um, at hetta fer at henda (Bogi Hansen). Í seinastu IPCC frágreiðing frá 2021 mettu tey at vatnstøðan hækkar í minsta lagi 30cm aftrat hesa øldina og í ringasta føri hækkar vatnstøðan 1,5m.

Lendið á oynni liggur 3 metrar yvir verandi vatnstøðu og er soleiðis tryggjað ímóti hækkandi vatnstøðu. Verjugarðurin er 2,5m yvir lendið og 5,5m yvir vatnstøðu.

Sosialur trivnaður og fjølbroytni - Á Havoy býr eitt gott bland av fólki. Bústaða útboðið í støðd og kostnaði, er snikkað til at møta tørvinum hjá breiddini. Støk, pør, barnafamiljur, eldri og ung lesandi. Bústaðarøkið er skipað í tríggjar býlingar, við einum felagsøki miðskeiðis á oynni. Á felagsøkinum er spælipláss, bál og grill pláss og eitt felagshús.

Tilvitað nýtsla
Felagselagshentleikar sum deilibilar og veitsluhølir v.m. eru skynsamar loysnir til eitt húsarhald. Eitt pláss til ruskskiljing er til alllar býlingar. Burturkastið verður skilt og lívrunnið tilfar verður savnað til kompost. Í túnunum eru pláss sett av til snórar at turka vaskiklæði. Snórarnir skullu hanga nærhendis bústøðunum, so fólk hava sjónlligt samband til snórarnar frá bústaðnum. Pláss skal setast av til smá vakstrarhús, hjallar og fluguskáp, sum ger tað møguligt at turka og goyma mat, og samstundis varveita føroyskan matarsið.

Belegningar á gøtum og plássum til ruskskiljing, skulu steinleggjast við haldgóðum tilfari. Koyrivegurin inn á oynna er einasta flatan við asfalti.

# 02

# //TILGONGD




02.1 - Høvuðstættir
02.2 - Amboðskassin



# HØVUÐSTÆTTIR

**Leiðreglur**

Tá vit nú fyrireika eina framtíðar menning- og útbygging av Fuglafjarða býi, so er okkara mál at innbyggja loysnir sum stuðla undir mótstøðuføri, soleiðis at menningin verður støðug og haldbar, langt inn í framtíðina.

Hetta verður gjørt við 3 høvuðs leiðreglum:

## *1. Minni fótprent meira náttúra*

## *2. Felagsskapur*

## *3. Vinna + list = <u>nýmenning</u>*

# MARGFELDI










Inntrivið, sum verður gjørt í bergið fyri at fáa tilfar til vega at byggja oynna við, meta vit er minni, enn tey inntrivini sum nú vera gjørd við siðbundnu útstykkingunum, har meir og meir hagalendi verður tikið til bústaðabygging.

Vit mótrokna tøkuna av livistøðum á havbotninum, við at skapa nýggj livistøð frammvið verjugarðinum. Verjugarðurin er ikki beinur. Við fyrimynd í nesinum hava vit skapt verjugarðin við tveimum nesum. Ymiskleikin í skapinum, yvirflatuni og eksponeringini førir lívmargfeldi við sær.

# MEIRA NÁTTÚRA











Veðurlagsbroytingar og náttúran og hennara lívfrøðiliga margfeldi, hanga óloysiliga saman. Íðnaðargerðin og brúksmynstri hevur lagt eitt ov stórt trýst á náttúruna, sum nú vísir seg við ógvusligum náttúruvanlukkum. Átøk sum Bruntland rapportin, ST heimsmálini, Paris avtalan og altjóða náttúruverju sáttmálar, eru øll tiltøk sum vit og onnur heimssamfeløg hava tikið undir við.
Fuglafjarða býur er umgirdur av vakrari náttúru men hevur kortini eitt avmarkað rásarúm. Býurin byrjar við sjóvarmálan og er nú í summum førum vaksin upp um bøgarðarnar.

Klassiska sethúsa útstykkingin tekur nógv lendi og í brattlendi ger ein byggibúgving ógvuslig inntriv. Fyri at verja um lívfrøðiliga margfeldi, ræður um at avmarka tøkuna av hagalendinum og lata hagan verða til taks hjá fuglum, skorðdýrum, plantum og øðrum livandi organismum, sum øll gera nyttu har tey eru.

Hesar lokalu vistskipaninar spæla eisini stóran leiklut í tí globalu vistskipanini, sum okkara oyggjar eru týdningamikil partur av. Ein vistskipan, sum millum annað er fyritreytin fyri at tjaldrið og aðrir upplívgandi summargestir vitja okkum, eftir langan og stravnan vetur.

Ístaðin fyri at taka meiri hagalendi, skapa vit nýtt byggilendi niðri í bygdini við at taka grót úr berginum og leggja tað út á fjørðin. Har laga vit grótið til eina oyggj, sum verður nýtt lendi til framtíðar búseting fyri menniskju og nýggj lívøki hjá plantum og ymsum djórasløgum.

# SAVNA OG SPJAÐA




**Spjaða**: so hvørt sum tú byggir longur niðan brekkurnar, skapar tú eina stórri frástøðu til miðbýin. Avleiðingin er at bústaðarøkini missa sambandi við miðbýin.

**Savna**: nýggja byggilendið á oynni, liggur í beinleiðis sambandið við miðbýarøkið. Íbúgvarnir á oynni ferðast ígjøgnum miðbýarøkið fleiri ferðir um dagin, tey skapa lív og eru soleiðis við til at savna býin.

# FÓTPRENT

Minni fótprent

Oyggin er 21.000 m² og rúmar 67 bygningum til bústað og 1 bygningi til dagstovn og felagshølir. Sama støðd á øki lagt út til siðbundna sethúsabygging, rúmar 23 bygningum. Á oynni eru 131 búeindir. Tá er roknað við sjálvstøðugum íbúðum á veghædd í 1/3 av bygningunum og lestrarbústaðir í 3 bygningum eru eisini íroknaðir.

Á oynni rúmast fleiri fólk á minni øki enn tað ger í klassisku sethúsaøkjunum. Á oynni kunnu búgva 500 fólk og er hetta 4 ferðir fleiri fólk enn í sethúsaøkinum. Tá er rokna við 4 fólkum pr. sethús.




23 grundøkir í Toftabønum , samanborið við hvat nýggi býlingurin fyllir

# VEÐUR



Verjugarður og planting verja býlingin móti lágættini

Veðrið í Fuglafirði er sum veðrið aðrastaðni. Tað eru góðar ættir og tað eru ringar ættir. Tað sjáldsama fyri Fuglafjørð og aðrar bygdir norðanfyri er, at høgættin er keðilig. Á hásumri kann tað verða sum ein vetrardag um hann er høgur. Lágættirnar eru hinvegin lýggjar og á einum summardegi við sól er tað næstan sum at verða á Hawaii.

Høgættirnar hava kava við sær og oftani nógvan kava samanborið við eitt nú Tórshavn. Lágættirnar eru hinvegin vátar.

Ringasta veðrið er tá hann kemur oman av Skarðinum. Hetta kann verða skaðaætt. Veðrið er eisini ymiskt alt eftir hvar tú ert í bygdini. Lágættirnar eru verri niðri í bygdini, meðan høgættirnar eru verri ovalaga í bygdini.

Fyri miðbýin og Havoy er tað serliga lágættirnar, sum tað skal takast hædd fyri og fyri høgættunum, sum koma oman av Skarðinum.
Omanfyri eru diagrammir sum vísa hvussu veðrið háttar seg. Aftast eru vindsimuleringar, sum vísa at sum heild er lívd, har tað skal verða.

Fyri lágættirnar er verjugarðurin og planting góð fyri mikroklimaði







Vindrósan (Tórshavn)

# DNA'IÐ



Í Fuglafirði eru bestu fortreytir fyri at seta búgv

Uppskotið tekur útgangsstøði í tí DNA, sum Fuglafjørður hevur. Eitt er søgan, har búseting hevur verið longu í víkingatíðini. Nakað annað er, at tað í hundrað ár hevur verið nógv virksemi í bygdini. Bygdin var sýslumansbygd og harvið hevði bygdin status í Eysturoynni. Tú kemur heldur ikki uttanum at tað eru fáar bygdir har tað er so nógvar stórar fyritøkur og arbeiðspláss, sum tað er í Fuglafirði. Hetta sæst eisini aftur í bygdalívinum. Stór skip og lítil skip leggja dagliga førnig upp á kajuna. Ein meldur av virksemi, sum næstan ongan enda tekur. Tað er áhugavert at sita við vindeyga og hyggja út á fjørðin. Náttúran er eisini stórsligin við høgu fjøllunum rundan um bygdina.

Virksemi, mentan, skúlaskapur, ítróttur, íverksetan og náttúran tætt knýtt á einum lítlum staði.

Bestu fortreytir fyri at seta búgv.





# FRÁGREIÐING

Vit hava valt at skipa uppskotið í einum amboðskassa. Tað merkir at tað eru fleiri tiltøk at seta í verk. Ikki er neyðugt at alt kemur beinanvegin, men um tú hevur eina ætlan og støðugt arbeiðir við henni, so kemur tú, um ikki á mál beinanvegin, so mikið langt fram á leið, at tað ger mun og tey mál, sum eru sett einaferð verða rokkin.

Tað er eisini umráðandi at hava fyri eygað at evnini í amboðskassanum kunnu broytast og nýggj leggjast til.

Á komandi síðum hava vit eina stutta frágreiðing um hvørt evnið, so tað ber til at fáa eina innflúgving, so tað er lættari at skilja uppskotið og hví vit hava gjørt sum vit hava gjørt.

Aftast eru ein longri undirbyggjandi frágreiðingar um evnini.



# STRATEGIIN




At fáa fatur í teimum ungu er ein týðandi fortreyt fyri fólkavøkstri

Ein býur, sum ikki hevur vøkstur, er ikki ein býur í menning. Aðalmálið fyri Fuglafjørð er at tryggja ein lut í fólkavøkstrinum sum er í Føroyum. Helst skal vøksturin verða størri enn grannakommunurnar.

Tað skal verða lættari og bíligari at seta føtur undir egið borð enn í grannakommunum.

Tað skal verða “kul” at búgva í Fuglafirði, tí her eru tey ungu, ítrótturin, útbúgvingar, livandi handilslív, matstovur, kaféir, skeinkistøð og ikki minst eitt livandi mentanarlív.

# BÚSETINGIN



Styrkin í uppskotinum er at byggingin kann bæði skipast í størri ella minni verkætlarnir, sum tryggjar framdriftina

Stórar bústaðarverkætlanir eru tungar at lyfta. Vit hava ikki siðvenju við bústaðarfeløgum og íleggjarum, sum menna stórar bústaðarverkætlanir. Tú skalt ikki seta títt álit á, at tað verður eitt felag, sum fíggjar og mennir alla verkætlanina. Tað skulu verða fleiri, so verkætlanin hevur framdrift.

Vit høvdu mælt til at skipa part av bygginigini sum lutaíbúðarfelag, har spekulatión ikki er líka eyðsýnd, sum í eigaraíbúðum. Vit mæla eisini til at privata húskið fær møguleikan, tí hesi handla skjótari enn bústaðarfeløg og íleggjarar.

Tað eina útilokar ikki hitt. Við at skipa byggingina á hendan hátt, trúgva vit, at tað verður eitt størri margfeldi í byggingini.

# PARKERINGSTUNNIL



Parkeringstunnil undir bygdini ger tað møguligt at veita grót til uppfylling á fjørðinum. Soleiðis fæst eitt bústaðarøki, har bilar ikki fylla alt.

Vit eru av tí áskoðan, at plássið millum húsini er ov virðismikið til parkeringspláss. Plássið millum húsini eigur at verða halgað uppihaldi, felagsskapinum og ítrivi og harvið betri trivnaði.

Grótið, sum kemur úr tunnlinum, svarar til grótið, sum skal brúkast til tann fyrsta byggistig av verkætlanini. Afturat tí eru eisini aðrir fyrimunir við parkeringstunnlinum í mun til burðardygd, sum eru lýstir aðrastaðni

Frá parkeringstunnlinum til tann nærmasta bústaðin eru bert 100 m.

170 nýggj parkeringspláss gera eisini mun í býnum

# UMKOYRINGARTUNNIL



Umkoyringartunnil frá Gjógvará og norð á kajuna loysir avbjóðingarnar við tungu ferðsluni til tey næstu hundrað árini.

Tað hevur í áratíggjur verið tosað um ampan av tí tungu ferðsluni, virksemið á kajuni skapar. Tann tunga ferðslan bara veksur. Tað er ringt at fáa eygað á hvørjar lættar loysnir eru í hóma annað enn at gera okkurt hissini, so ferðin verður avmarkað. Uttan iva hevði okkurt munagott verið gjørt, um tað á nakran gjørligan máta lat seg gera í eini handavend.

Spurningurin tú eigur at seta tær, er hvat hevði verið tann ultimativa loysnin og hvussu verður hon sett út í kortið.

Í Fuglafirði er tunnlar eitt vanligt fyribrigdi, so í so máta er ein umkoyringartunnil ikki eitt nakað óvanligt. Grótið, sum fæst úr tunnlunum verður eisini brúkt til útfylling at vaksa um havnalagið. Tí er umkoyringartunnil ikki bert ein útreiðsla til ferðsluna, men eisini eitt íkast til havnalagið.

# GONGUBÝURIN



Fuglafjørður er ein vælegnaður býur sum gongubýur.

Natúrligt sentur - Bygdin er háttað í eitt U-skap. Í boganum liggja skúli, dagstovnur, sambýli og mentunarhúsið, sum allir eru týdningamiklir kommunalir stovnar fyri allar býarbúgvar. Byg-ningar liggja allir sentralt og frástøðan til búseting norðanfyri og heimanfyri er líka long.

Tað sama er galdandi fyri búsetingina á Havoy, sum liggur í beinleiðis sambandi við mentunartorgið

# STIGBÝTI



Parkeringstunnilin er ein avgerandi fortreyt fyri uppskotinum og skal gerast fyrst.

Byggistig:

1. at fylla út uttanfyri verandi bátahyl og flyta bátahylin
2. at seta bingjubýin (smáar íbúðir) upp.
3. at fylla ein part av bátahylinum upp og byggja bústaðir
4. at byggja plássið við kaféina og byggingina á Bugnum
5. at byggja rundanum Mentanarhúsið, m.a. listahøll.
6. at fylla út restina og byggja bústaðir og ansingarstovnin.
7. at byggja niðanfyri FK

# KOSTNAÐIR



Hendan verkætlan er  bæði bíligari fyri kommununa og tann sum byggir.

Í Fuglafirði er ikki óvanligt at tú skalt brúka 3-400 túsund bara til at grava út og spreingja. Hesa útreiðsluna sleppur tú undan. Leggur tú hetta saman við útreiðslur til ein bil, so svarar tað til, at tú hevur 3-4 túsund krónur meira at liva fyri um mánaðin. Hetta kann fyri nógv fólk verða upphæddin, sum manglar í  fyri at fáa endarnar at røkka saman.

Hvat kostprísurin er at byggibúgva ein bústað kann verða ymiskur, men tað mann tátta upp í eina hálva millión ella meira um samanborið verður við bústaðarbyggingina úti á Land. Okkara pástandur er at tað verður bíligari per bústaðareind enn tað kostar at gera grundstykkir byggibúgvin. Vit pástanda eisini, at tað ikki bert er kommunan, sum sparir pengar, men at húskini eisini spara pengar.

Hetta er ein sokallað win win støða

# TÍÐARÆTLAN OG FRAMDRIFT



***Ár 2042 búgva 2042 fólk í Fuglafirði***

Hetta er eitt framsøkið mál at seta sær, men ikki ómøguligt um farið verður í gongd beinanvegin. Hetta er meira stórætlað enn 2.500 fólk í ár 2050. Tað eru bara 16 ár til 2042, sum merkir at málið er í eygsjón og ítøkiligt og tryggjar framdrift.

Vit hava skrúva verkætlanina soleiðis saman, at so skjótt sum uppfyllingin er liðug, so verður bingjubýurin settur upp. Hetta bæði fyri at senda eitt greitt signal um at hetta meira kommunan í álvara, men eisini at gagnnýta íløguna beinanvegin.

Umráðandi er at tað er ein framdrift, so fortreytirnar fyri trivnaði er til staðar frá fyrsta degi. Vit hava lagt okkum eftir, at verkætlanin hevur so fáa forðingar sum gjørligt.



# SJÁLVBYGGING





Føroyingar byggja sínar bústaðir. Tað gevur eisini okkurt serstakt.

Føroyingar hava altíð bygt síni egnu hús og enn eru flestu bústaðarverkætlanirnar sjálvbyggjarar.

Fólk eru sera røsk at taka ein hond í byggingina og sjáldan koma føroyingar til lyklaklár hús. Við hjálp frá familju og vinum verður nógv innanveggja gjørt. Hetta er nakað sum liggur í okkara uppaling, at vit skulu taka hond um okkara tilveru. Hava seyð og taka slaktið upp. Hava bát og gera mat úr tí sum fiskað verður. Fara í grind. Duga at fáa mat úr einum djóri. Hesin dynamikkur sæst eisini aftur í okkara arkitekturi og er nakað sermerkt fyri okkara samleika. Vit halda at hetta er vert at varðveita, tí tað hevur eitt margfeldi, sum ikki kann planleggjast. Tað skal heldur ikki fara “yvir gevind”.



# MENTAN









Tað hevði verið nakað heilt serligt at savna tónleik, ritlist og myndlist á einum staði.

Fuglafjørður hevur eitt ríkt mentanarlív og góðar umstøður. Taka vit tónleikin, so er í Fuglafirði fleiri sangkór, eitt Hornorkestur, umframt rytmiskir bólkar. Musikkskúlin er eisini virkin í skúlanum. Í Fuglafirði eru eisini onnur mentanartiltøk. Her kann nevnast mentanardagar, harmonikufestivalur og bindifestivalur. Bygdin hevur eisini eitt virki trúarlív.

Vit halda at tíðin er komin til at víðka Mentanarhúsið til meira enn tónleika framførslur og veitslur og hava skotið upp at víðka Mentanarhúsið við bókasavni og listahøll, so Mentanarhúsið veruliga gerst ein mentanarmiðdepil vit ikki hava sæð áður.

# LISTAHØLL







Hvat er meira eksotisk, enn eitt listasavn á bygd í Norðuratlantshavi í einum pulseraðum modernaðum býi

Í Føroyum er eingin listahøll fyri samtíðarlist burturav og enn minni list sum hyggur frameftir. Hetta saman við tí málbólkinum, sum vit hava sett ljóskastaran á, so hevur hetta eisini atdráttarmegi.

Frits Johannesen sáli slóðaði fyri framsýningum á Varmakeldu. Hann var ein kveikjari fyri nógv ung listafólk. Tað hevði verið í hansara anda at stovna eina listahøll fyri samtíðarlist.

Tá tú eisini hevur eina listaútbúgving, sum hægri lestur, í bygdini, so gevur alt hetta meining.

# ÚTBÚGVINGAR OG NÝMENNING





Fuglafjørður hevur altíð verið miðdepil í Eysturoynni fyrir útbúgvingum.

Nú miðnámsskúlin er í grannalagnum er tíðin búgvin at stíla hægri og fáa hægri útbúgvingar, sum hava tilknýti til tað sum Fuglafjørður hevur og sum ikki finst aðrastaðni. Fyrimunurin er, at í Fuglafirði er eitt virkið vinnulív við nógvum akademiskum størvum og góðir møguleikar fyri gransking og "hands on" læring.

Í Fuglafirði eru fleiri fyritøkur, við serkunnleika, sum virka á alheimsmarknaði í Norðurhøvum.

Betri møguleikar fyri nýmenning finnast ikki um okkara leiðir. Alt á einum staði.

# HOSTELL



Hevur tú nakað serligt, sum hevur atdráttamegi, so koma ferðafólkini

Tað eigur at verða sum mál at hava gistingarmøguleikar í Fuglafirði. Ásannandi, at tað er torført at fáa ferðafólk, sum vilja verða í høvuðsstaðnum, at gista í Fuglafirði, so ber til at hyggja eftir hvat onnur ferðandi leita eftir.

Um tú hevur eitt pulserandi ungdómslív, er ikki óhugsandi at ung velja at royna nakað annað enn tað siðbundna ferðamannalívið.

Hevur tú okkurt serligt so er møguleikin at fáa fatur í hetta segmentið, sum leita eftir eini øðrvísi feriu.

Her kann tað listarliga umhvørvið, sum longu er í Fuglafirði, hava eina atdráttarmegi, sum ger tað møguligt at hava gisting í býnum.

# PLANTING





Planting hevur stóran týdning fyri lívd og trivna

Havoy er ein grøn oyggj. Har eru trø, runnar, urtir og blómur sum tæna fleiri endamálum. Fremsta endamálið er at skapa liviumstøður hjá kyktum og fuglum, síðan at skapa lívd ímillum húsini, sum ger tað møguligt hjá føroyingum at økja um løturnar til útitilhald.

Lívd í túnunum og ein kaffimugur saman við grannanum við fuglasangi afturvið, er ein uppliving sum ger gerandisdagin til eina veitslu.



# FRÍLØTUVIRKSEMI

Samlað sæð, hava støð til fríløtuvirksemi ein sentralan leiklut at skapa heilsugóðar, burðardyggar býir, sum gagnar trivnaðinum hjá tí einstaka og harvið eisini býnum.

Gøtur, ítróttaranlegg eggja til fysiskar rørslur.

Náttúruøkir eru góð fyri tað mentalu heilsuna og trivnaðin.

Spælipláss, felagsøkir og pláss gagna felagsskapinum og styrkir tey sosialu bondini og samveru.

Økir kunnu eisini hava umhvørvisligar fyrimunir fyri biodiversitetin.

# SØGULIGT DNA




65159


Vatnaktivitetshús
Strond
Sauna og umklæðing til dypping
Søgusigandi spælipláss
Flakar og maritimt spæl
Roðraneyst og fitness
Seiðaberg
Samtíðar listahøll
Bókasavn
BIBLIOTEK
Mentunnarhús
Hostell
Uttandura svimjuhylur

# 03

# //ÁTØK




03.1 - Støðumynd 1:500
03.2 - Støðumynd 1:200
03.3 - Heildarætlan
03.4 - Visualiseringar

# STØÐUMYND 1:500




Støðumynd - strond 2
1 : 500

# STØÐUMYND 1:200




65159

# HEILDARÆTLAN & SKURÐUR








Løtur ímillum býlingar



Framsíður av ymiskum búeindum



Náturan nær heimi og lív ímillum hús



Útsýni til vatn og bygd




Lestraríbúðir nær bústøðum. Ættarlið hittast í gerandisdagnum



Lestraríbúðir við útsýn á hav.



Bústaðir við bátabrúgvarnar - Marina



Framsíðir ið vísa ymiskleika, tekstur, litir og tilfar



Myndlistaframsýningar
- áskoðarar vilja síggja tað nýggja



Útbygging av mentunarhúsinum við bókasavnið og listahøll



Pláss fyri at eksperimentera





Søguforteljandi spælipláss har børn bæði stuttleika sær og læra lokala søgu



Vælveruhentleikar til havsvimjarar



Grøna økið framvið Skarðsá  og áarløkurin far samband við fjøruna aftur

# PLANTING



Høvuðsbólkar:
1. lágur vøkstur, 2. miðal vøkstur, 3. soliter høg trø, 4. urtagarðsvøkstur

Dømi um plantusløg:

- Lágur vøkstur nær sjónum
  Armeria maritima, Leymus arenarius
- Lágur vøkstur inni á oynni
  Baraldur, trøllakambur og Spirea
- Solitær trø høg og lág
  Sorbus dodong, Pica glacua
- Urtagarðsvøkstur

Havoy er ein grøn oyggj. Har eru trø, runnar, urtir og blómur sum tæna fleiri endamálum. Fremsta endamálið er at skapa liviumstøður hjá kyktum og fuglum, síðan at skapa lívd ímillum húsini, sum ger tað møguligt hjá føroyingum at økja um løturnar til útitilhald.
Lívd í túnunum og ein kaffimugur saman við grannanum við fuglasangi afturvið, er ein uppliving sum ger gerantisdagin til eina veitslu.
Verjugarðurin er lagdur við gróti móti sjónum. Móti búsetingini verður skráin plantaður.
Planturnar á oynni verða skipaðar í 4 høvuðsbólkar. Yvirskipaða ætlanin er at leiða vindin burtur frá økjum har fólkini eru. Plantuhæddin hækkar stigvíst, har hæddin er lægst uttan móti verjugarðinum og hægst mitt á oynni. Vindurin viknar so hvørt sum hann rakar leyvið á runnum og trøðum. Tey hægstu trøðini verða plantaði sum soliter trø, fyri at avmarka skugga á lendinum og útsýnismiss. Trøð og runnar skulu vera eitt bland av leyvfallandi- og vetrargrønum. Vetrargrønar plantur geva lívd eisini um veturin. Plantur sum liggja tættast við sjógvin mugu tola saltrákið í luftini. Ein góður skikkur er at kanna, hvørjar plantur trívast nær sjónum í Fuglafirði í dag, hesar kunnu eisini nýtast á Havoy.

1. Lágur vøkstur nær sjónum


sjógræs - Leymus arenarius


Sjógræs - Armeria maritima


Baraldur


Spirea

2. Lágur vøkstur inni á oynni:


Trøllakambur

3. miðal vøkstur


Hyllini runnur_Sambucus nigra


Eldrunnur_embothrium coccineum

3. Soliter trø - høg og lág


"sørvænget røn"/sorbus dodong


Hvítgran/Pica glacua

4. urtagarðsvøkstur


Páskalilja / Narcissus Pseudonarcissus


trøllakambur/Dryopteris filix mas

65159

# BLÁ OG GRØN SAMBOND






Grøna økið framvið Skarðsá og áarløkurin far samband við fjøruna aftur

# 04

# //FRÁGREIÐING




04.1 - Frágreiðingar framhald



# Frágreiðingar framhald

## STRATEGIIN

Ein býur, sum ikki hevur vøkstur, er ikki ein býur í menning. Aðalmálið fyri Fuglafjørð er at tryggja ein lut í fólkavøkstrinum sum er í Føroyum. Helst skal vøksturin verða størri enn kappingarneytarnir.

Ein strategi fyri at tryggja fólkavøkstur er sjálvandi at halda uppá tey ungu, so tey verða verandi ella flyta aftur. Tað er ikki nóg mikið at halda uppá tey sum eru fødd í Fuglafirði, um tú skal røkka málinum um at í ár 2042 skulu 2042 fólk búgva í Fuglafirði. Tú mást eisini fáa fatur í ungum sum búgva í eysturøkinum og Skálafjørðinum.

Umframt tey ungu, so skal tað eisini verða lættari og bíligari at seta føtur undir egið borð enn í grannakommunum. Á henda hátt hevur tú ein kjans at fáa fatur í øðrum, sum undir vanligum umstøðum ikki vildu valt Fuglafjørð sum sína bústaðar kommunu.

Umframt at tað skal verða lætt og bíligari, er neyðugt at tað eisini er "kul" at búgva í Fuglafirði. Fuglafjørður skal verða ein livandi og spennandi býur, har felagsskapurin er ein sjálvsagdur partur. At tað er eitt livandi handilslív, matstovur, kaféir, skeinkistøð og ikki minst eitt livandi mentanarlív.

Skúli, útbúgvingar, gransking og íverkseting eru týðandi táttir í einum spennandi býi.

Fuglafjørður hevur fostrað nógv dugnalig listafólk, sum hava fingið íblástur í tí pulserandi lívinum og náttúruni. Hetta er ikki nakað sum skal uppfinnast av nýggjum. Hetta er sálin í bygdini. Við at geva listini enn betri karmar fer at fáa listina at blóma og at fáa fleiri kreativ fólk til býin.



# GONGUBÝURIN




Tað er ein sannroynd at ein býur sum gevur fótgangarum fyrimunir framum at geva bilum fyrimunir, er ein hugnaligari og tryggari býur at vera í. Møguleikarnir fyri uttandura tilhaldi gerast størri og sansaliga upplivingin av býarrúminum og tí sum har er, verður so nógv ríkari og størri.
Fuglafjørður er ein vælegnaður býur sum gongubýur.

Natúrligt sentur - Bygdin er háttað í eitt U-skap. Í boganum liggja skúli, dagstovnur, sambýli og mentunarhúsið, sum allir eru týdningamiklir kommunalir stovnar fyri allar býarbúgvar. Bygningar liggja allir sentralt og frástøðan til búseting norðanfyri og heimanfyri er líka long.

Tað sama er galdandi fyri búsetingina á Havoy, sum liggur í beinleiðis sambandi við mentunartorgið

Natúrligt miðstaðarøki - býurin hevur eisini eitt natúrligt miðstaðarøki frá Karvatoftum og og út í Støð.

Í miðstaðarøkinum eru handlar, skrivstovur, matstovur, hárfríðkanarstovur og søvn v.m.

Parkeringstunnil - Í verkætlanini verður skotið upp at gera ein parkeringstunnil við inn- og útkoyring frá karvatoftum, norðanfyri handilin hjá Ellendersen. Parkeringstunnilin er staðsettur sentralt í miðbýnum við stuttari frástøðu til handlar, mentanartilboð í miðbýnum og nýggju búsetingini á Havoy.

Á Havoy eru ongir bilar millum húsini. Hetta er møguligt tí frástøða til arbeiðspláss og stovnar er ikki størri enn at til ber at ganga.

Í førum tá bilflutningur er neyðugur, eru deilibilar staðsettir á oynni, ein møguleiki og bussur er á mentunartorginum.

# GONGUBÝURIN




**2 min**

1 Mentarnarhús ♥
2 Listahøll/Bókasavn ♥
3 Havsvimjing
4 Pizza
5 Siloa
6 Á Haraldsen
7 Parkeringstunnil
8 Stovnur/felagshús
9 Býartorg ♥
10 Skeinkistað
11 Kafé
12 Kappróðraneyst
13 Býarsavn ♥
14 Kirkja
15 Mistaðarlund ♥
16 Bakkhúsini
17 Býráðssalur ♥
18 Hostell
19 Ribarhús ♥
20 Piddasahandil
21 Banki

**3 min**

22 Muntra matstova
23 FK matvøruhandil
25 Spælipláss á fiskastykkinum
31 Kirkjugarður
32 Heima á Sand
33 Víkingatoftir

**4 min**

24 Kommunulækna
26 Thabor
27 Eldrafelagið Borgin ♥
28 Skúli ♥
29 Spælipláss
30 Tannlækni
34 Svimjihylur

**5 min**

35 Barnagarður
36 ÍF húsið ♥
37 Fótbóltsvøllurin ♥
38 Gamli svimjihylur
39 Skarðsleiðin
40 Vesturstova +1min

Á yvirlitinum omanfyri sæst at tær flestu tíðandi funktiónir liggja fáa minuttir frá miðbýnum mált frá nýggja torginum við Mentanarhúsinum. Ikki minni enn 28 "funktiónir" eru 3 min frá torginum og allar funktiónir liggja innan fyri 5 minuttir.

Hetta er munandi minni enn tað sum vanliga verður roknað við sum rímiligar frástøður. Tað er eingin ivi um at hetta er eitt sera gott íkast til ein livandi bý. Tað eru fáir býir sum hava slíkar fortreytir.

# BÚSETINGIN

Bústaðarverkætlanir eru oftani ein tungur burður. Vit hava ikki siðvenju við bústaðarfeløgum og íleggjarum, sum menna stórar bústaðarverkætlanir. Hóast tað eru glottar at hóma, so er lítið sum týður uppá, at tú skal seta títt álit á, at tað verður eitt felag, sum fíggjar og mennir alla verkætlanina. Fyri verkætlanina er umráðandi, at búsetingin hevur framdrift og er framhaldandi og ikki liggur í andaleypi tí okkurt kom í vegin. Einki er so hugtungt, sum at síggja eitt økið liggja manntómt, tí fortreytirnar vóru skeivar.

Vit hava hugt rundan um okkum og duga at síggja, at størri verkætlanin er, tyngri er burðurin. Vit duga eisini at síggja, at har tað er ein møguleiki fyri stórum profitti, so ber til. Dømi um hetta er búsetingin við Karlamagnusarbreyt, sum fyri ein stóran part er bygdur av smærri íleggjarum, sum hava selt eigaraíbúðirnar til áhugað og vunnið sær stórar upphæddir. Vit síggja eisini at tað einkulta sethúsið ikki er nakar trupuleiki at fáa upp at standa. Um tað er ein sjálvstøðugur bygningur ella eitt raðhús, sær ikki út til at verða nakar munur. Um tað er í trimum hæddum, er heldur ikki nøkur avbjóðing.

Hvørjir drívarar eru til eina slíka verkætlan?

**Kommunan**
Sjálvandi er kommunan ein týðandi leikari, men tað skal ikki verða uppgávan hjá kommununi at byggja bústaðirnar. Uppgávan er at skapa røttu fortreytirnar og skumpa til verkætlanina. Kommunan átti at staðið fyri tí partinum sum er kollegie/ungdómsíbúðir. Hetta er ein týðandi partur av konseptinum og at skapa trivnað og vøkstur. Hetta er ein íløga í framtíðina og menningina av býnum. Tað er torført at byggja íbúðir til tey ungu undir handilsligum treytum. Tí er hetta er ein almenn uppgáva.

**Bústaðarfeløg**
Í løtuni hava vit bert tað eina bústaðarfelagið, sum er alt ov lítið at menna eitt almannagagnligum endamáli. Bústaðir kunnu hava ein leiklut, men ikki nakað at seta sítt álit á. Tað er sjálvandi møguligt at stovna eitt bústaðarfelag til hesa verkætlanina, men tað krevur stóra fíggjarliga orku har tú bindir stóran kapital. Meira um hetta seinni.

**Pensjónsfeløg**
Í seinastuni er Lív farin inn í bústaðarverkætlanir. Pensiónsfeløg hava, sum flestu kunnugt, ein tolnan kapital sum passar væl inn í bústaðarbygging. Pensjónsfeløg kundu verið ein drívari í bústaðarbyggingini.

**Privatir íleggjarar í bústaðarfeløg**
Tað eru fleiri stórar fyritøkur í Fuglafirði, sum kundu verið áhugað í at gjørt íløgur í býlingin. Tað verður (vónandi) kapping um arbeiðsmegina í framtíðini. At skapa góðar fortreytir fyri rekruttering av starvsfólkum, er eisini týdningarmikið fyri vinnulívið í Fuglafirði. Her er góðir bústaðarmøguleikar ein góð fortreyt.

**Privat húski**
Føroyingar hava altíð sjálvir fingið sín bústað til vega. Fyrr bygdu húskini sjálv húsini. Onkur fekk ein timburmann at hjálpa, meðan onnur fingu familju og vinir at hjálpa sær. Nú á døgum eru tað ikki nógv sum sjálvi smíða, men tey flestu standa sjálv fyri verkætlanini. Um tað so er at keypa eini sniðhús ella tað er at fáa ein fyritøku at byggja fyri seg er hips um haps. Føroyingar eru vanir sjálvir at fáa húsini upp at standa. Hetta er ein dygd og ein stórur drívari til at fáa framdrift í búsetingina. Meðan íleggjarar og bústaðarfeløg taka langa tíð um at taka støðu, so er tað einkulta húskið rímuliga skjót at taka støðu, fáa fígging til vega og byggja. Miðað er móti at stórur partur av byggingini er privat húski, sum byggja til sín sjálvan

**Privatir íleggjarar**
Sum fyrr nevnt, so er privatir íleggjarar, sum byggja og selja á handilsligum grundarlagi eisini ein drívari. Spurningurin er um

tað er líka stórur áhugi fyri at byggja og selja í Fuglafirði sum tað er í Havn. Ivaleyst er váðin størri á bygd enn hann er í Havn, har eftirspurningurin av góðum grundum er størri. Tað eru fáar verkætlanir, sum privatir íleggjari hava bygt á bygd við sølu fyri eygað.

**Lutaíbúðir**
At skipa onkran part sum lutaíbúðir kundi eisini verið ein møguleiki. Lutaíbúðir sum vit kenna tað í Danmark er ein gott fyri tey, sum skulu seta búgv fyri fyrstu ferð. Tað krevst ikki líka stór fígging, sum tað ger við at byggja sjálvur. Sum útgangsstøði er tann handilsligi parturin minni, so at skilja, at tín vinningur er avmarkaður samanborið um tú byggir og selur sjálvur. Lutaíbúðir krevja meira umsiting at byrja við. Vit hava ikki siðvenju fyri hetta slagi av bygging. Sjálvt um tað hevði verið ynskiligt, at skipa ein stóran part í einum lutaíbúðarfelagi, tí tað hevði verið lættari at ogna sær ein bústað enn tað er at skula fíggja og byggja sín bústað. Vit skjóta upp at kommunan kannar møguleikan at skipa eitt lutaíbúðarfelag, sum kann standa fyri ein parti av verkætlanini. Tað hevði gjørt tað møguligt hjá nógvum ungum at fingið føtur undir egið borð.

Tíðir broytast og tað gera fortreytirnar eisini. Tað er umráðandi at býlingurin kann mennast og hava neyðugu framdriftina uttan mun til hvat fyrferst. Býlingurin er skipaður á ein slíkan hátt at tað einkulta húskið kann byggja sítt egna hús og kanska leiga ein part út. Tað skal eisini verða møguligt fyri íleggjarar, bústaðarfeløg og onnur at byggja.
Vit trúgva eisini uppá at um tann eini leisturin ikki riggar, so eru aðrir leistir, sum kunnu bera á mál. Tað skal helst ikki ganga ein hálv øld innan oyggin er útbygd.

Vit halda at styrkin í okkara uppskoti er at byggingin bæði kann skipast í størri verkætlanum, men eisini í smærri verkætlanum. Hendan verkætlanin hevur ikki ein knaga at hanga verkætlanina á men eina heila knagarekkju.

Vit síggja alt ov ofta, at í býlingum fer alt fríøkið til parkeringspláss og bilar. Fríøkir, sum skuldi verið ætlað fólki til uppihald.

Vit eru greið yvir at bilurin er eitt neyðugt flutningstól í flestu húsarhaldum og sjálvandi skal bilurin hava sítt pláss. Vit halda tó, at plássið millum húsini er ov virðismikið til parkering av einum flutningstóli. Plássið millum húsini eigur at verða halgað uppihaldi, felagsskapinum og ítrivi og harvið einum betri trivnaði.

Tað er sjálvandi neyðugt at kunna koma tætt at húsinum til av og áseting. Tað skal eisini verða møguligt hjá akførum í neyðsendaraørindum at koma fram til bústaðin. Pláss er eisini til onkrar bilar í býlinginum, fyri tey sum hava ein tørv at hava ein bil nærhendis. Tey flestu í býlinginum hava neyvan tørv á einum bili, sum vit kenna tað í øðrum bygdum og býum, har alt er langt frá har tú býrt. Her er alt í gangifrástøðu, handlar, matvørðuhandlar, samkomuhús, kirkja, vertshús, lækni, kommunuskrivstova, skúli og ítróttur.

Tað er alment kent, at har tað er langt til alt, kann eitt húski gera upp til 20 túrar um dagin í bili. Onkutíð meira, serliga tá talan er um familjur, har børn luttaka í ymsum frítíðarvirksemum. Hinvegin koyra eldri pør fáar túrar í mun til barnafamiljurnar.

Tað er ongastaðni í Føroyum, heldur ikki í Tórshavn, at tú hevur ein stóran býling har gangifrástøðan til alt tú hevur brúk fyri í dagligdegnum. Tað eru eini 7-800 arbeiðspláss í bygdini so um tú ert ein av teimum og býrt í nýggja býlinginum, so er lagamanni at súkla "norður á kajuna" til arbeiðis. Um tú skalt av bygdini, so er bussambandið so mikið gott, at bilurin kann bíða til ráðini gerast betur. Hetta er nakað heilt serligt fyri býlingin.

Nógv verður tosað um at húsarhaldini í Føroyum eru vorðin so dýr, at ungar familjur og tey ungu ikki hava ráð at seta føtur undir egið borð. Her gera útreiðslurnar til ein og tveir bilar ikki støðuna betur.



# PARKERINGSTUNNIL





Um tú allíkavæl hevur ein bil ella báðar tveir, so er møguligt at parkera bilin í parkeringstunnell, sum er gjørd til endamálið. Sambært Bygningskunngerðini eru krøvini alt eftir hvat slag av bústøðum talan er um. Til íbúðarbygging er kravið 1 parkeringspláss til hvørjar 75m$^2$, meðan tað er 0,5 til íbúðir í studentagørðum. Í stórum rundum tølum vildi kravið til byggingina, tá alt er liðugt, ligið á eini 150 parkeringspláss.

Parkeringstunnilin er staðsettur undir bygdini har inn og útkoyring norðanfyri Haraldsen. Tunnilin er gjørdur eftir sama leisti, sum Tórshavnar kommuna arbeiðir við, at spreingja undir Havnini. Ein einsrættaður vegur við skráparkering á báðum síðum. Breiddin er 17,8m og hæddin 7m á miðjuni. Tunnilin er ein rundkoyring undir bygdini, har tú koyrir út og inn í sama stað. Av trygdarávum, eru út- og innkoyringin atskildrað, so tær eru at rokna sum tvær sjálvstøðugar útgangir. Pláss er fyri 170 bilum, sum er nakað meira enn kravið. Hinvegin so verða tað eisini tikin parkeringspláss uttanfyri Mentanarhúsið, tá tað skal útbyggjast við listahøllini. Um hetta er neyvt tað rættað talið skal eftirkannast tá verkætlanin hevur fingið endaligt skap. Tað er stutt frá út-og innkoyringinini út til býlingin. TIl tann nærmasta bústaðin eru tað bert 100 m, meðan tað eru 250m til tann ytsta bústaðin.

Grótið, sum kemur úr tunnlinum, svarar til grótið, sum skal brúkast til tann fyrsta partin av Havoy. Umleið 60 túsund rúmmetrar í leysum tilfari. At tað eru aðrir fyrimunir við parkeringstunnlinum í mun til burðardygd, verður lýst aðrastaðni.

# Umkoyringartunnil




Tað hevur í áratíggjur verið tosað um ampan av tí tungu ferðsluni, sum virksemið á kajuni skapar. Tann tunga ferðslan bara veksur. Tað er ringt at fáa eygað á hvørjar lættar loysnir eru í hóma. Uttan iva høvdu tær verið framdar, um tað á nakran gjørligan máta lat seg gera. Vit hava umrøtt fleiri loysnir. Eitt nú at tunga ferðslan bert var um náttina ella í eyðmerktum tíðarskeiðum á degnum. Vit hava eisini umrøtt ymsar talgildar skipanir, sum ávarðar fólk um at nú er ein lastbilur ávegis ella fleiri skipanir, har førarnir allatíðina verða gjørdir varugir við, hvat ferðin er. Vit hava eisini tosað um at gjørt annan belegning á vegnum frá mentanarhúsinum og norð til Ribarhús ella FK. Ein belegningur, sum ger at tað óhøgligt at koyra skjótt og noyðir ferðina niður. Óansæð eigur hetta at verða gjørt, men hetta fær bara ferðina niður ikki talið av lastbilum niður. TIl hetta er einasta loysnin at gera umkoyringartunnil til tungu ferðsluna. Ein umkoyringartunnil, sum byrjar uttan fyri húsin hjá Poul Rustin og endar við síðuna av goymslutunnlunum hjá Havsbrún.

Umkoyringartunnilin er áleið 2.200 metrar. Vit hava eisini kannað um tað hevði borið til at gjørt eina nýggja farleið frá Eiðnum og oman til Toftanes. Harfrá ein tunnil undir fjørðin og upp hinumegin. Hetta verður eftir okkara metin ein nógv dýrari farleið, tí tunnilin fer so djúpt, at hann verður so mikið langur, um brekkurnar ikki skulu gerast ov brattar. Harafturat skal gerast ein nýggjur vegur frá Varmakeldueiði og oman á Toftanes. Hetta verður ein nógv dýrari loysn enn umkoyringartunnilin vit hava skotið upp.

Í Fuglafirðið eru longu 1500 metrar av goymslu/frystitunnlum. Sum skilst eru ætlanir um at byggja líka nógv, ella harum. Tað er ikki nakað óvanligt at spreingja tunnlar undir bygdini í Fuglafirði og tí halda vit, at í longdini er ein umkoyringartunnil einasta loysnin, sum kemur ferðsluóskilinum til lívs.

Í Fuglafirði hevur tað altið verið brúk fyri grótinum til uppfylging. Havoy hevur eisni brúk fyri 40 túsund rúmmetrum til tað síðsta byggistigið. Í umkoyringstunnlinum eru eini 200 túsund rúmmetrar í leysum tilfari. Ein partur av hesum kundi farið í síðsta byggistigi, meðan restin kann fara til uppfylging á havnalagnum.

# Stigbýti

Tað fyrsta sum skal gerast, er parkeringstunnilin. Hann er fortreyt fyri at tað kann byggjast, sum uppskotið fyriliggur. Bilarnir skulu verða onkustaðni. Parkeringstunnilin veitir eisini grótið, sum skal brúkast í 1. byggistigi.

1. byggistig er at fylla út uttanfyri verandi bátahyl soleiðis at tað uppfyllingin kemur so mikið langt út at hann ger ein munna yvir av verandi grótkasti og kajini á eystara síðu. Tástani ber til at flyta bátarnar úr bátahylinum og gera útfyllingina í verandi bátahyli

2. byggistig er at seta bingjubýin upp, sum bæði er til byggiplássið, men eisini sum kollegiebústað. Samstundis verður sett hol á kollegie- og ungdómsíbúðirnar. Byrjað verður eisni at byggja tey uttastu húsini, antin sum privata bygging ella sum íbúðarbygging

3. byggistig er at fylla ein part av bátahylinum upp og byggja teir bústaðir, sum liggja innast. Tað er eisini at taka ytsta partin av grótkastinum upp og grava “siglingarrennuna” millum oynna og fastlandið. Rennan hevur tvær høvuðsfunktiónir. At fáa ringrensl í bátahylin, so lívið í fjørðini vónandi kemur aftur. Hitt er at tað er møguligt hjá børnum at sigla ígjøgnum á flakum ella smáum bátum.

4. byggistig er at byggja plássið við kaféina og byggingina á Bugnum

5. byggistig er at byggja rundanum Mentanarhúsið. Ein listaskáli fyri samtíðarlist. Hugsað er eisini at flyta bókasavnið sum partur av mentanarhúsinum. Bókasavnið er í dag meira enn bøkur. Bókasavnið er karmurin um framløgur, kjak og undirhald. Hetta sampakkar væl við ætlanina at byggja listaskálan.

6. byggistig er at fylla út tað síðsta sum er eftir og byggja bústaðri og ansingarstovnin.

7. byggistig er at byggja niðanfyri FK, har Petur Larsen heldur til og har egningarskúrarnir eru. Hetta virksemið nýtist ikki at taka so gott pláss, tá tað kann brúkast til fólkavøkstur.

Av ørðum ikki sokallaðum verkætlanum í miðbýarætlanin, sum ikki eru raðfestar, er: gøturnar, belegningur, planting, bygningar í samband við teir aktivitetir, sum eru heima á sandi. Gøtan framvið fjørðuni og brúgvin frá Piddasa brúgv og yvirum.

# Kostnaðir

Kommunan hevur sum siðvenju at selja grundøkini til ein fastan prís, sum aloftast er minni enn kostprísurin. Tí hevur tað ikki tað ikki so stóra ávirkan fyri keyparan hvat byggibúningin kostar. Tað útreiðsluna ber kommunan. Keyparin skal hinvegin bera útreiðsluna av at grava út. Í Fuglafirði er tað dýrari enn nógva aðrastaðni. 3-400 túsund skalt tú rokna við at hetta kostar. Hetta sparir keyparin, tí grundøkið er “planerað”. Tí kunnu tey, sum ynskja at seta búgv á Havoy, sleppa munandi bíligari enn um tey settu búgv onkra aðrastaðni. Ímynda tær, at tú eisini spardi ein bil, hvussu nógv bíligari tú kanst sita fyri um mánaðin enn um tú eitt nú búði í Syðrugøtu og skuldi koyra til alt.

Tað er heldur ikki týdningarleyst, at tað einki jørðarbeiði tá tú skalt byggja. Í Fuglafirði er ikki óvanligt at tú skalt brúka 3-400 túsund bara til at grava út og spreingja. Hesa útreiðsluna sleppur tú undan. Leggur tú hetta saman við útreiðslur til ein bil, so svarar tað til at tú hevur 3-4 túsund krónur meira at liva fyri um mánaðin. Hetta kann fyri nógv fólk verða upphæddin, sum manglar í fyri at fáa endarnar at røkka saman.

Sum fyrr nevnt, so selur kommunan grundøkini undir kostprís. Hvat kostprísurin er fyri ein bústað kann verða ymiskur, men tað mann tátta upp í eina hálva millión ella meira um samanborið verður við bústaðarbyggingina úti á Land. Okkara pástandur er at tað verður bíligari per bústaðareind enn tað kostar at gera grundstykkir byggibúgvin. Vit pástanda eisini, at tað ikki bert er kommunan, sum sparir pengar, men at tann einkulti, sum byggir eisini sparir pengar. Hetta er ein sokallað win win støða.

Parkeringstunnil

Ein parkeringstunnil, sum tann uppskotið leggur upp til kostar einar 60 milliónir, men tá hevur tú eisini fingið eina uppfylling til einar 130 búðstaðir umframt eitt miðbýarøki við stórum møguleikum sum gera býin til ein dragandi bý, sum fólk ynskja at búgva í.

Umkoyringartunnilin

Ein umkoyringartunnil kostar einar 200 milliónir. Hetta er ein rættuliga stór íløga, men tann dagin tá brúk er fyri meira gróti til havnalagið, so er tað ikki óhugsandi at tað ber á mál. Vit eru greið yvir at ein slík upphædd er í meira lagi enn kommunan í løtuni kann svølgja. Hinvegin kann kommunan arbeiða víðari við tankanum og hvør veit um tað ikki onkuntíð í framtíðini fer at bragda um vinnulívið í Fuglafirði spælir við og sær nyttuna í hesum.

Lutaíbúðir

Vit hoyra næstan dagliga, at tað er so dýrt hjá teimum ungu familjunum, at seta føtur undir egið borð. Um tú ikki skalt stuðla hesum, so er ikki nógvir møguleikar at gera tað léttari fyri hesum. At leiga er ein møguleiki, men vansin er, at tú sparir ikki upp til títt egna hús, um tað er tað tú ynskir í framtíðini. Við lutaíbúðarleistinum, hevur tú møguleika at spara upp við einum parti av tíni sokallaðari húsaleigu. Tú hevur eisini eigaralut í umhvørvinum tú býrt í og skapar tað trivnað fyri øll. Leigarabústaðir hava ikki somu effekt.

Ein annar fyrimunur við lutaíbúðum er, at tað fíggjarliga er gjørligt fyri tey flestu at skava saman til eitt innskot uppá nakrar hundrað túsund krónur. Um bankin er lagaligur, so kanst tú lána nakað av tí innskotinum. Tú verður ikki líka hart spentur, samanborið eigaraíbúðum. Í lutaíbúðum hevur tú eisini tikið tað handilsliga út, sum merkir at íbúðirnar ikki verða seldar til hægstbjóðandi, men eftir útveganarvirðinum, sum verður prístalsviðgjørt. Sum aðrastaðni nevnt, so mæla vit kommununi at kanna hetta nærri, tí tað kann gera tað møguligt hjá nógvum familjum at seta búgv. Tá kann tað verða at tú kemur langvegis frá fyri at fáa tann møguleikan. Tað er sera jaligt.

# Tíðarætlan og framdrift

Málið er at ár 2042 búgva 2042 fólk í Fuglafirði. Hetta er eitt framsøkið mál at seta sær, men ikki ómøguligt um farið verður í gongd beinanvegin. Fyrst skal tað politiska avgreiðast, síðani planlegging og bygging og ikki minst innflyting. Vit hava skrúva verkætlanina soleiðis saman at so skjótt sum uppfyllingin er liðug, so verður bingjubýurin settur upp. Hetta bæði fyri at senda eitt greitt signal um at hetta meira kommunan í álvara, men eisini at gagnnýta íløguna beinanvegin.

Um vit skulu verða realistisk, so kemur ganga tað eini 7 ár innan nakar flytir inn á Havoy og tá skal ganga skjótt. Tá eru minni enn 10 ár at røkka málinum um um 2040 fólkum. Hetta er møguligt, men so skal tað eisini berast skjótt at. Størsta forðingin er tann politiska raðfestingin. Kommunan skal raðfesta útfyllingina fram um so nógv annað. Tá tað er gjørt, so er rásin slóðað fyri einari bústaðarverkætlan, sum er størri enn tá Toftabøurin var tikin til bústaðarøki ella tá Kambsdalur var útstykkjaður til sethús. Vit eru eisini av tí áskoðan, at tað fer at ganga skjótari at byggja Havoy lidna enn fyrr nevndu verkætlanirnar. Á Havoy eru fleiri bústaðir enn á øllum Toftabønum og heilt norður á Bakka. Tað sigur ikki so lítið um menningarmøguleikarnar.

Tá tú byggir ein nýggjan býling úti á bygd, sum víst í uppskotinum, so er umráðandi at tað er ein framdrift, so fortreytirnar fyri trivnaði er til staðar frá fyrsta degi. Vit hava lagt okkum eftir, at verkætlanin hevur so fáa forðingar sum gjørligt. Ikki tí at vit kunnu beina burtur allar forðingar sum koma í framtíðini, tí tað ber ikki til. Hinvegin vita vit eisini, at ein slík verkætlan tekur ár, kanska áratíggjur. Tá tað tekur so langa tíð frá tú byrjar til tú ert liðugur, so koma nógvar hendingar, sum tú ikki hevði roknað við. Vit hava hesi seinastu 30 árini havt tvær fíggjarkreppur, fólkafráflyting, heimsfarsøtt, fiskaloysi, bara fyri at taka nakrar keðiligar hendingar, ið leggja fót fyri slíkum verkætlanum. Politiskir vindar hava eisini tað við at broytast. Eingin ivi er um at pílarnir fara ikki bara peika uppeftir. Tá tað gongur upp, so kann tað eisini ganga niður. Vit hava sæð í øðrum verkætlanum, at um ein íleggjari hoppar frá, so steðgar alt upp og tað ganga nógv ár innan nakar bati er at hóma. Hetta er oyðileggjandi fyri menningina av býlinginum, tí tað kann sýnast sum um tað tekur ongan enda.

Vit mugu ásanna, at Fuglafjørður ikki er ein stórbýur, har eftirspurningurin eftir íbúðum ongan enda tekur. Vit trúgva tó, at okkara uppskot kann gera Fuglafjørð til eitt spennandi stað at búgva, sum fólk fara at fjálgast um. Men innan tað fer at henda, er neyðugt at tryggja at sjálvt um okkurt kemur í vegin, sum tað uttan iva kemur, so hevur verkætlanin framhaldandi møguleikar at menna seg.

Hesi viðurskifti meta vit verða týdningarmikil um ein so stór verkætlan skal hava lív lagað:

Verkætlanin kann skerast í minni eindir, sum eru léttari at sodna. Eru vit heppin, so eru fleiri stórir íleggjarar ella feløg, sum vilja átaka sær at byggja og leiga út. Hetta ger at tað er skjótt at koma upp úr jørðini. Um íleggjarnir ikki standa í bíðirøðum, so ber til at selja eitt grundstykki í senn til tey sum eru áhugað. Tú kanst enntá eggja teimum fyrstu, við at lova teimum bestu staðsetingarnar. Tað er ikki óhugsandi at tað hevði komið væl við.

Tað hevði eisini verið ein framsíggið, um tað var stovnað eitt lutaíbúðarfelag, sum tók sær av einum parti av býlinginum. Sí meira um hetta undir kostnaði.

Vit hava havt sum mál at fáa tey ungu at fjølgast í Fuglafirði. Fært tú fatur í teimum, so er tað onkur sum festir røtur og verður verandi og stovnar familju. Til hetta er neyðugt at gera bústaðir til tey ungu. Kollegie og ungdómsíbúðir. Vit eru av tí sannføring at tað eru fleiri, sum vóru komin langvegis frá um tey fingu møguleikan til eina ungdómsíbúð. Vit hava hugsað at tú setti upp ein lítlan bý upp við bingjum. Ein sokallaðan “kontainarabý” Fyrimunurin er at hann er skjótur at seta upp. Hann vendir sær eisini til tey ungu. Og ikki minst hann kann flytast, tá/um hann kemur í vegin fyri útbyggingini.



# Sjálvbygging

Føroyingar hava altíð bygt síni egnu hús. Tað er ikki fyrr enn í nýggjar tíð, at møguleiki hevur verið hjá føroyinginum at keypt eini liðug hús ella íbúð. Tó so, enn eru flestu verkætlanirnar sjálvbyggjarar. Ikki so at skilja at mann smíðar sjálvur, men at mann er byggiharri, sum tekur sær av fígging, fær grundøkið til vega og summi halda seg heldur ikki at tekna sjálv. Tey fáa onkran at grava út og onkran annan at byggja húsini. Fólk eru sera røsk at taka ein hond í byggingina og sjáldan koma føroyingar til lyklaklár hús. Við hjálp frá familju og vinum verður nógv innanveggja gjørt. Hetta er nakað sum liggur í okkara uppaling, at vit skulu taka hond um okkara tilveru. Hava seyð, fara út at fiska, fara í grind. Duga at fáa mat úr einum djóri. Hesin dynamikkur sæst eisini aftur í okkara arkitekturi og er nakað sermerkt fyri okkara samleika. Vit halda at hetta er vert at varðveita, tí tað hevur eitt margfeldi, sum ikki kann planleggjast. Tó so, so skal tað stýrast, so tað ikki fer "yvir gevind".

# Vindsimuleringar




5 m/s landnyðringi




5 m/s landnyðringi




15 m/s landnyðringi




15 m/s landnyðringi

# Dagsljóssimuleringar



Tímar av dagljósi. **Mars**



Tímar av dagljósi. **Juni**



Tímar av dagljósi. **Septembur**



Tímar av dagljósi. **Desembur**

# FUGLAFJØRÐUR

uppskot til nýggjan miðbý



# FUGLAFJØRÐUR

## uppskot til nýggjan miðbý

2042 - 2042

Upskotið arbeiðir fyri einum fólkavøkstri í býnum, sum er grundaður á at steðga fráflyting og eggja til tilflyting. Hetta verður gjørt við at gera býin dragandi`.

Málið er at í 2042 skulu 2042 fólk búgva í Fuglafirði. Hetta er eitt framsøki mál at seta sær. Um tú roknar uppá hetta, so er hetta meira framsøki enn 2050 visjónin. Ikki tí at tað er nakað galið við henni, tvørturímóti. Tað er eitt tekin um kommunan ynskir at tað skal henda nakað.

Uppá góð 17 ár skal alt fyrireikingararbeiðið gerast og bústaðir byggjast og fólk flyta inn. Tað tekur tíð og oftani tíð har lítið og einki hendur.

### Heimurin anno 2024

Vit eru í eini rembingartíð. Heimssamfelagið er undir ógvusligari broyting sum krevur nýggja støðutakan til hvussu vit skulu innrætta okkara samfelag.

Vitlíkið (Al) er ein "disruptari" og spreingir verandi mørk bæði á arbeiðsmarknaðinum og í okkara daglidegi. Fíggjarkervið er merkt av nýggjum siðvenjum innan burðardygd og ringbúskap. COVID farsóttin hevur broytt arbeiðsmynstrið, vit kunnu røkkast í digitalum fundarhølum úr øllum heraðshornum. Umhvørvið er nú av álvara merkt av veðurlagsbroytingum og lívfrøðiligari margfeldiskreppu. Politikkur er merktur av stórum spenningum millum heimsstórveldini og talað verður um sosialt rættvísi, líkavirði og menniskjarættindi. Mentanaðarligar og demografiskar broytingar í samfemfelagnum, bera í sær broyttan hugburð til virðir og normar, eitt ørðvísi, fjøltáttað familjumynstur og fólkaflyting frá bygd til bý.

### Fuglafjørður anno 2024

Vinnan hevur síðan 60´ini ment seg støðugt til í dag at veita 1000 størv. Hetta eru fyritøkur sum hava ment seg frá líttlum, til í dag at vera altjóða vitanarfyritøkur. Her eru størv til ófaklærd-, faklærd-, til fólk við hægri útbúgvingum og granskarar.

Kambsdalur verður í skemti róptur "Silicone Kambsdal", Umframt miðnámsskúli eru her eisini hátknologiskar fyritøkur, við altjóða status og eitt prototypuverkstað, eitt sokallað Fab Lab. Tískil kann vinnulív, skúlaskapur, nýskapan, gransking og íverksetan ganga hond í hond og er samanberingin við silicone Valley, tí ikki av órøttum.

í Fuglafirði búgva1633 fólk, 100 færri kvinnur enn menn. Rákið sum vísir at tey yngru flyta til størri staðir sæðst eisini her. Tó so, hevur Fuglafjørður eitt ríkt mentunarlív. Listin hevur eins stóran týdning fyri fuglfirðingar. Bygdin hevur fostrað fleiri listafólk, bæði innan myndlist, tónlist og ritlist.

### Fuglafjørður anno 2042

Fuglafjørður verður staðurin har listmentanin og fiskivinnan eru dívmegin. Fuglafjørður verður fyri Føroyar sum Glasgow er fyri Skotland. Ein transformeraður tungíðnaðarbýur til ein vitanartungan vinnu og lestrarbý við høvuðsdenti á tí kreativa og listini.

Eitt umhvørvið við list, íverksetan, háteknologi og fjøltáttaðari fiskivinnu er ikki bert dragandi fyri tey ungu í Fuglafirði, sum eru uppvaksin í hesum umhvørvinum, men er eisini dragandi fyri so nógv onnur ung, aðrastaðni í Føroyum og aðrastaðni í heiminum. Harumframt verður Fuglafjørður ein nútímans býur sum byggir á holistisk burðardygg grundsjónarmið, sum taka atlit at socialum trivnaði, náttúruverju og tilvitaðum forbrúki.

Miðbýurin í Fuglafirði verður ein livandi miðbýur. Fólkatættleikin um miðstaðin ger, at har er altíð fólk at síggja á gøtunum, á kaféum og í matstovum. Samværi millum vinnuna og listina hava skapt nýggjar vinnugreinar og fleiri nýggj arbeiðspláss. Nýggja bústaðarøkið Havoy er eitt umtókt stað at búgva. Har hevur tú tað besta "of both worlds" tú hevur títt egna hús, privata útiøkið, grønt umhvørvið og kortini býrt tú mitt í býnum við ríkum møguleikum fyri felagslívi.

### Havoy - nýtt bústaðarøki

Navnið Havoy - mong nøvn vóru havd á loftið til oynna, men, tá navnið Havoy kom upp, klingaði sangurin hjá Kim Larsen í oyrunum.."Jeg bor til leje på Havoyije" og tankarnir fóru til skald og trubadurar í Fuglafirði, sum so hegnisliga spæla við orðum og fáa hetta humoristiska, eitt sindur skeiva fuglafjarða lyndi fram í skaldskapin.

Havoy verður eitt norðuratlantiskt Hawaii, við verju fyri stormum frá atlantshavinum. Verjugarður og salttolnar plantur, runnar og trø, skapa eitt veðurgott frístað fyri íbúgvarnar. Túnini eru bilfrí so børn og vaksin kunnu spæla og flyta seg frítt og trygt ímillum býlingar og tún. Felagsskapur og samanhald er ein sjálvfylgja. Lívfrøðiliga margfeldi, tilvitað nýtsla og sosiali trivanðurin eru grundasteinar undir Havoy.

Verjugarður og bátabrúgvar - Havoy hevur verjugarð úr gróti móti havsíðuni og timburbrúgvar ímóti fjørðusíðuni.

Lívfrøðiliga margfeldi - Inntrivið sum verður gjørt í bergið fyri at fáa tilfar til vega at byggja oynna við, meta vit er minni, enn tey inntrivini sum nú vera gjørd við siðbundnu útstykkingunum, har meir og meir hagalendi verður tikið til bústaðabygging. Vit mótrokna tøkuna av livistøðum á havbotninum, við at skapa nýggj livistøð frammvið verjugarðinum. Verjugarðurin er ikki beinur. Við fyrimynd í nesinum hava vit skapt verjugarðin við tveimum nesum. Ymiskleikin í skapinum, yvirflatuni og eksponeringini førir lívmargfeldi við sær.

Viðv. hædd á verjugarði - Ein avleiðing av veðurlagsbroytingunum verður at vatnstøðan hækkar. Vísindafólk eru ikki í iva um, at hetta fer at henda. Í seinastu IPCC frágreiðing frá 2021 mettu tey at vatnstøðan hækkar í minsta lagi 30cm aftrat hesa øldina og í ringasta føri hækkar vatnstøðan 1,5m.

Lendið á oynni liggur 3 metrar yvir verandi vatnstøðu og er soleiðis tryggjað ímóti hækkandi vatnstøðu. Verjugarðurin er 2,5m yvir lendið og 5,5m yvir vatnstøðu.

Sosialur trivnaður og fjølbroytni - Á Havoy býr eitt gott bland av fólki. Bústaða útboðið í stødd og kostnaði, er snikkað til at møta tørvinum hjá breiddini. Støk, pør, barnafamiljur, eldri og ung lesandi. Bústaðarøkið er skipað í tríggjar býlingar, við einum felagsøki miðskeiðis í oynni. Á felagsøkinum er spælipláss, bál og grill pláss og eitt felagshús.

Tilvitað nýtsla
Felagselagshentleikar sum deilibilar og veitsluhølir v.m. eru skynsamar loysnir til eitt húsarhald. Eitt pláss til ruskskiljing er til allar býlingar. Burturkastið verður skilt og lívrunnið tilfar verður savnað til kompost. Í túnunum eru pláss sett av til snórar at turka vaskiklæði. Snórarnir skullu hanga nærhendis bústøðunum, so fólk hava sjónlligt samband til snórarnar frá bústaðnum. Pláss skal setast av til smá vakstrarhús, hjallar og fluguskáp, sum ger tað møguligt at turka og goyma mat, og samstundis varveita føroyskan matarsið.

Belegningar á gøtum og plássum til ruskskiljing, skulu steinleggjast við haldgóðum tilfari. Koyrivegurin inn á oynna er einasta flatan við asfalti.



DNA Diagram

### MÁLIÐ

Upskotið arbeiðir fyri einum fólkavøkstri í býnum, sum er grundaður á at steðga fráflyting og eggja til tilflyting. Hetta verður gjørt við at gera býin dragandi

Málið er at í 2042 skulu 2042 fólk búgva í Fuglafirði. Hetta er eitt framsøki mál at seta sær. Um tú roknar uppá hetta, so er hetta meira framsøki enn 2050 visjónin. Ikki tí at tað er nakað gali við henn, tvørturímóti. Tað er eitt tekin um kommunan ynskir at tað skal henda nakað.

Uppá góð 17 ár skal alt fyrireikingararbeiðið gerast og bústaðir byggjast og fólk flyta inn. Tað tekur tíð og oftani tíð har lítið einki hendur.



Havoy - nýtt bústaðarøki

Navnið Havoy - Mong nøvn vóru havd á loftið til oynna, men, tá navnið Havoy kom upp, klingaði sangurin hjá Kim Larsen í oyrunum.."Jeg bor til leje på Havoyije" og tankarnir fóru til skald og trubadurar í Fuglafirði, sum so hegnisliga spæla við orðum og fáa hetta humoristiska, eitt sindur skeiva fuglafjarða lyndi fram í skaldskapin.

Havoy verður eitt norðuratlantiskt Hawaii, við verju fyri stormum frá atlantshavinum. Verjugarður og salttolnar plantur, runnar og trø, skapa eitt veðurgott frístað fyri íbúgvarnar. túnini eru bilfrí so børn og vaksin kunnu spæla og flyta seg frítt og trygt ímillum býlingar og tún. Felagsskapur og samanhald er ein sjálvfylgja. Lívfrøðiliga margfeldi, tilvitað nýtsla og sosiali trivanðurin eru grundasteinar undir Havoy.

felagsøkinum er spælipláss, bál og grill pláss og eitt felagshús.

### MARGFELDI

Inntrivið sum verður gjørt í bergið fyri at fáa tilfar til vega at byggja oynna við, meta vit er minni, enn tey inntrivini sum nú vera gjørd við siðbundnu útstykkingunum, har meir og meir hagalendi verður tikið til bústaðabygging. Vit mótrokna tøkuna av livistøðum á havbotninum, við at skapa nýggj livistøð frammvið verjugarðinum. Verjugarðurin er ikki beinur. Við fyrimynd í nesinum hava vit skapt verjugarðin við tveimum nesum. Ymiskleikin í skapinum, yvirflatuni og eksponeringini førir lívmargfeldi við sær.

### MEIRA NÁTTÚRA

Veðurlagsbroytingar og náttúran og hennara lívfrøðiliga margfeldi, hanga óloysiliga saman. Íðnaðargerðin og brúksmynstri hevur lagt eitt ov stórt trýst á náttúruna, sum nú vísir seg við ógvusligum náttúruvanlukkum. Átøk sum Bruntland rapportin, ST heimsmálini, Paris avtalan og altjóða náttúruverju sáttmálar, eru øll tiltøk sum vit og onnur heimssamfeløg hava tikið undir við.
Fuglafjarða býur er umgirdur av vakrari náttúru men hevur kortini eitt avmarkað rásarúm. Býurin byrjar við sjóvarmálan og er nú í summum førum vaksin upp um bøgarðarnar.

Klassiska sethúsa útstykkingin tekur nógv lendi og í brættlendi ger ein byggibúgving ógvuslig inntriv. Fyri at verja um lívfrøðiliga margfeldi, ræður um at avmarka tøkuna av hagalendinum og lata hagan verða til taks hjá fuglum, skorðdýrum, plantum og øðrum livandi organismum, sum øll gera nyttu har tey eru.

Hesar lokalu vistskipaninar spæla eisini stóran leiklut í tí globalu vistskipanini, sum okkara oyggjar eru týdningamikil partur av. Ein vistskipan, sum millum annað er fyritreytin fyri at Tjaldrið og aðrir upplívgandi summargestir vitja okkum, eftir langan og stravnan vetur.

Ístaðin fyri at taka meiri hagalendi, skapa vit nýtt byggilendi niðri í bygdini við at taka grót úr berginum og leggja tað út á fjørðin. Har laga vit grótið til eina oyggj, sum verður nýtt lendi til framtíðar búseting fyri menniskju og nýggj lívøki hjá plantum og ymsum djórasløgum.

### FÓTPRENT

Oyggin er 21.000 m2 og rúmar við 67 bygningum til bústað og 1 bygningi til dagstovn og felagshølir. Sama stødd á øki lagt út til klassiska sethúsabygging, rúmar 23 bygningum. Á oynni eru 131 búeindir. Tá er roknað við sjálvstøðugum íbúðum á veghædd í 1/3 av bygningunum og lestrarbústaðir í 3 bygningum eru eisini íroknaðir.

Á oynni rúmast fleiri fólk á minni øki, enn tað ger í klassisku sethúsaøkjunum. Á oynni kunnu búgva 500 fólk og er hetta 4 fleiri fólk enn í sethúsaøkinum. Tá er rokna við 4 fólkum pr. sethús.




Spjaða: So hvørt sum tú byggir longur niðan brekkurnar, skapar tú eina stórri frástøðu til miðbýin. Avleiðingin er at bústaðarøkini missa sambandi við miðbýin.

Savna: nýggja byggilendið á oynni, liggur í beinleiðis sambandi við miðbýarøkið. Íbúgvarnir á oynni ferðast ígjøgnum miðbýarøkið fleiri ferðir um dagin, tey skapa lív og eru soleiðis við til at savna býin.

### DNA`IÐ

Uppskotið tekur útgangsstøði í tí DNA, sum Fuglafjørður hevur.
Eitt er søgan, har búseting hevur verið longu í víkingatíðini. Nakað annað er at tað í hundrað ár hevur verið nógv virksemi í bygdini. Bygdin var sýslumansbygd og harvið hevði bygdin status í Eysturoynni. Tú kemur heldur ikki uttanum at tað eru fáar bygdir har tað er so nógvar stórar fyritøkur og arbeiðspláss, sum tað er í Fuglafirði. Hetta sæst eisini aftur í bygdalívinum. Stór skip og lítil skip leggja dagliga førnig upp á kajuna. Ein meldur av virksemi, sum næstan ongan enda tekur. Tað er áhugavert at sita við vindeyga og hyggja út á fjørðin. Náttúran er eisini stórsligin við høgu fjøllunum rundan um bygdina.

Virksemi, mentan, skúlaskapur, ítróttur, íverksetan og náttúran tætt knýtt á einum lítlum staði.

Bestu fortreytir fyri at seta búgv.

### STRATEGIIN

*At fáa fatur í teimum ungu er ein týðandi fortreyt fyri fólkavøkstri*

Ein býur, sum ikki hevur vøkstur, er ikki ein býur í menning. Aðalmálið fyri Fuglafjørð er at tryggja ein lut í fólkavøkstrinum sum er í Føroyum. Helst skal vøksturin verða størri enn grannakommunurnar.

Tað skal verða lættari og bíligari at seta føtur undir egið borð enn í grannakommunum.

Tað skal verða "kul" at búgva í Fuglafirði, tí her eru tey ungu, ítrótturin, útbúgvingar, livandi handilslív, matstovur, kaféir, skeinkistøð og ikki minst eitt livandi mentanarlív.

### BÚSETINGIN

*Styrkin í uppskotinum er at byggingin kann bæði skipast í størri ella minni verkætlarnir, sum tryggjar framdriftina*

Stórar bústaðarverkætlanir eru tungar at lyfta. Vit hava ikki siðvenju við bústaðarfeløgum og íleggjarum, sum menna stórar bústaðarverkætlanir. Tú skalt ikki seta títt álit á, at tað verður eitt felag, sum fíggjar og mennir alla verkætlanina. Tað skuli verða fleiri, so verkætlanin hevur framdrift.

Vit høvdu mælt til at skipa part av byggingini sum lutaíbúðarfelag, har spekulatión ikki er líka eyðsýnd, sum í eigaraíbúðum. Vit mæla eisini til at privata húskið fær møguleikan, tí hesi handla skjótari enn bústaðarfeløg og íleggjarar.

Tað eina útilokar ikki hitt. Við at skipa byggingina á hendan hátt, trúgva vit, at tað verður eitt størri margfeldi í bygginini.

### GONGUBÝURIN

*Fuglafjørður er ein vælegnaður býur sum gongubýur.*

Natúrligt sentur - Bygdin er háttað í eitt U-skap. Í boganum liggja skúli, dagstovnur, sambýli og mentunarhúsið, sum allir eru týdningamiklir kommunalir stovnar fyri allar býarbúgvar. Bygningar liggja allir sentralt og frástøðan til búseting norðanfyri og heimanfyri er líka long.

Tað sama er galdandi fyri búsetingina á Havoy, sum liggur í beinleiðis sambandi við mentunartorgið

### UMKOYRINGARTUNNIL

*Umkoyringartunnil frá Gjógvará og norð á kajuna loysir avbjóðingarnar við tungu ferðsluni til tey næstu hundrað árini.*

Tað hevur í áratíggjur verið tosað um ampan av tí tungu ferðsluni, virksemið á kajuni skapar. Tann tunga ferðslan bara veksur. Tað er ringt at fáa eygað á hvørjar lættar loysnir eru í hóma annað enn at gera okkurt hissini, so ferðin verður avmarkað. Uttan iva hevði okkurt munagott verið gjørt, um tað á nakran gjørligan máta lat seg gera í eini handavend.

Spurningurin tú eigur at seta tær, er hvat hevði verið tann ultimativa loysnin og hvussu verður hon sett út í kortið.

Í Fuglafirði er tunnlar eitt vanligt fyribrigdi, so í so máta er ein umkoyringartunnil ikki eitt nakað óvanligt. Grótið, sum fæst úr tunnlunum verður eisini brúkt til útfylling at vaksa um havnalagið. Tí er umkoyringartunnil ikki bert ein útreiðsla til ferðsluna, men eisini eitt íkast til havnalagið.

### PARKERINGSTUNNIL

*Parkeringstunnil undir bygdini ger tað møguligt at veita grót til uppfylling á fjørðinum. Soleiðis fæst eitt bústaðarøki, har bilar ikki fylla alt.*

Vit eru av tí áskoðan, at plássið millum húsini er ov virðismikið til parkeringspláss. Plássið millum húsini eigur at verða halgað uppihaldi, felagsskapinum og ítrivi og harvið betri trivnaði.

Grótið, sum kemur úr tunnlinum, svarar til grótið, sum skal brúkast til tann fyrsta byggistig av verkætlanini. At tað eru eisini aðrir fyrimunir við parkeringstunnlinum í mun til burðardygd, sum eru lýstir aðrastaðni

Frá parkeringstunnlinum til tann nærmasta bústaðin eru bert 100 m.

170 nýggj parkeringspláss gera eisini mun í býnum

65159







## STIGBÝRI

*Parkeringstunnilin er ein avgerandi fortreyt fyri uppskotinum og skal gerast fyrst.*

*Byggistig:*

1. at fylla út uttanfyri verandi bátahyl og flyta bátahylin
2. at seta bingjubýin (smáar íbúðir) upp.
3. at fylla ein part av bátahylinum upp og byggja bústaðir
4. at byggja plássið við kaféina og bygginginga á Bugnum
5. at byggja rundanum Mentanarhúsið, m.a. listahøll.
6. at fylla út restina og byggja bústaðir og ansingarstovnin.
7. at byggja niðanfyri FK

## TÍÐARÆTLAN OG FRAMDRIFT

*Ár 2042 búgva 2042 fólk í Fuglafirði*

Hetta er eitt framsøkið mál at seta sær, men ikki ómøguligt um farið verður í gongd beinanvegin. Hetta er meira stórætlað enn 2.500 fólk í ár 2050. Tað eru bara 16 ár til 2042, sum merkir at málið er í eygsjón og ítøkiligt og tryggjar framdrift.

Vit hava skrúva verkætlanina soleiðis saman, at so skjótt sum uppfyllingin er liðug, so verður bingjubýurin settur upp. Hetta bæði fyri at senda eitt greitt signal um at hetta meira kommunan í álvara, men eisini at gagnnýta íløguna beinanvegin.

Umráðandi er at tað er ein framdrift, so fortreytirnar fyri trivnaði er til staðar frá fyrsta degi. Vit hava lagt okkum eftir, at verkætlanin hevur so fáa forðingar sum gjørligt.

## MENTAN

*Tað hevði verið nakað heilt serligt at savna tónleik, ritlist og myndlist á einum staði.*

Fuglafjørður hevur eitt ríkt mentanarlív og góðar umstøður. Taka vit tónleikin, so er í Fuglafirði fleiri sangkór, eitt Hornorkestur, umframt rytmiskir bólkar. Musikkskúlin er eisini virkin í skúlanum. Í Fuglafirði eru eisini onnur mentanartiltøk. Her kann nevnast mentanardagar, harmonikufestivalur og bindifestivalur. Bygdin hevur eisini eitt virki trúarlív.

Vit halda at tíðin er komin til at víðka Mentanarhúsið til meira enn tónleika framførslur og veitslur og hava skotið upp at víðka Mentanarhúsið við bókasavni og listahøll, so Mentanarhúsið veruliga gerst ein mentanarmiðdepil vit ikki hava sæð áður.

## ÚTBÚGVINGAR OG NÝMENNING

*Fuglafjørður hevur altíð verið miðdepil í Eysturoynni fyrir útbúgvingum.*

Nú miðnámsskúlin er í grannalagnum er tíðin búgvin at stíla hægri og fáa hægri útbúgvingar, sum hava tilknýti til tað sum Fuglafjørður hevur og sum ikki finst aðrastaðni. Fyrimunurin er at í Fuglafirði er eitt virkið vinnulív við nógvum akademiskum størvum og góðir møguleikar fyri gransking og “hands on” læring.

Í Fuglafirði eru fleiri fyritøkur, við serkunnleika, sum virka á alheimsmarknaði í Norðurhøvum.

Betri møguleikar fyri nýmenning finnast ikki um okkara leiðir. Alt á einum staði.

## PLANTING

*Planting hevur stóran týdning fyri lívd og trivna*

Havoy er ein grøn oyggj. Har eru trø, runnar, urtir og blómur sum tæna fleiri endamálum. Fremsta endamálið er at skapa liviumstøður hjá kyktum og fuglum, síðan at skapa lívd ímillum húsini, sum ger tað møguligt hjá føroyingum at økja um løturnar til útitilhald.

Lívd í túnunum og ein kaffimugur saman við grannanum við fuglasangi afturvið, er ein uppliving sum ger gerantisdagin til eina veitslu.

## KOSTNAÐIR

*Hendan verkætlan er bæði bíligari fyri kommununa og tann sum byggir*

Í Fuglafirði er ikki óvanligt at tú skalt brúka 3-400 túsund bara til at grava út og spreingja. Hesa útreiðsluna sleppur tú undan.Leggur tú hetta saman við útreiðslur til ein bil, so svarar tað til, at tú hevur 3-4 túsund krónur meira at liva fyri um mánaðin. Hetta kann fyri nógv fólk verða upphæddin, sum manglar í fyri at fáa endarnar at røkka saman.

Hvat kostprísurin er at byggibúgva ein bústað kann verða ymiskur, men tað mann tátta upp í eina hálva millión ella meira um samanborið verður við bústaðarbyggingina úti á Land. Okkara pástandur er at tað verður bíligari per bústaðareind enn tað kostar at gera grundstykkir byggibúgvin. Vit pástanda eisini, at tað ikki bert er kommunan, sum sparir pengar, men at húskini eisini spara pengar.

Hetta er ein sokallað win win støða

## SJÁLVBYGGING

*Føroyingar byggja sínar bústaðir. Tað gevur eisini okkurt serstakt*

Føroyingar hava altíð bygt síni egnu hús og enn eru flestu bústaðarverkætlanirnar sjálvbyggjarar.

Fólk eru sera røsk at taka ein hond í byggingina og sjáldan koma føroyingar til lyklaklár hús. Við hjálp frá familju og vinum verður nógv innanvegga gjørt. Hetta er nakað sum liggur í okkara uppaling, at vit skulu taka hond um okkara tilveru. Hava seyð og taka slaktið upp. hava bát og gera mat úr tí sum fiskað verður. Fara í grind. Duga at fáa mat úr einum djóri. Hesin dynamikkur sæst eisini aftur í okkara arkitekturi og er nakað sermerkt fyri okkara samleika. Vit halda at hetta er vert at varðveita, tí tað hevur eitt margfeldi, sum ikki kann planleggjast. Tað skal heldur ikki fara “yvir gevind”

## LISTAHØLL

*Hvat er meira eksotisk, enn eitt listasavn á bygd í Norðuratlantshavi í einum pulseraðum modernaðum býi*

Í Føroyum er eingin listahøll fyri samtíðarlist burturav og enn minni list sum hyggur frameftir. Hetta saman við tí málbólkinum, sum vit hava sett ljóskastaran á, so hevur hetta eisini atdráttarmegi.

Frits Johannesen sáli slóðaði fyri framsýningum á Varmakeldu. Hann var ein kveikjari fyri nógv ung listafólk. Tað hevði verið í hansara anda at stovna eina listahøll fyri samtíðarlist.

Tá tú eisini hevur eina listaútbúgving, sum hægri lestur, í bygdini, so gevur alt hetta meining.

## HOSTELL

*Hevur tú nakað serligt, sum hevur atdráttamegi, so koma ferðafólkini*

Tað eigur at verða sum mál at hava gistingarmøguleikar í Fuglafirði. Ásannandi, at tað er torført at fáa ferðafólk, sum vilja verða í høvuðsstaðnum, at gista í Fuglafirði, so ber til at hyggja eftir hvat onnur ferðandi leita eftir.

Um tú hevur eitt pulserandi ungdómslív, er ikki óhugsandi at ung velja at royna nakað annað enn tað siðbundna ferðamannalívið.

Hevur tú okkurt serligt so er møguleikin at fáa fatur í hetta segmentið, sum leita eftir eini øðrvísi feriu.

Her kann tað listarliga umhvørvið, sum longu er í Fuglafirði, hava eina atdráttarmegi, sum ger tað møguligt at hava gisting í býnum.

## FRÍLØTUVIRKSEMI

*Samlað sæð, hava støð til fríløtuvirksemi ein sentralan leiklut at skapa heilsugóðar, burðardyggar býir, sum gagnar trivnaðinum hjá tí einstaka og harvið eisini býnum.*

Gøtur, ítróttaranlegg eggja til fysiskar rørslur.

Náttúruøkir eru góð fyri tað mentalu heilsuna og trivnaðin.

Spælipláss, felagsøkir og pláss gagna felagsskapinum og styrkir tey sosialu bondini og samveru.

Økir kunnu eisini hava umhvørvisligar fyrimunir fyri biodiversitetin.

65159







Vindsimuleringar






Verjugarður og planting verja býlingin móti lágættini

## VEÐRIÐ

Veðrið í Fuglafirði er sum veðrið aðrastaðni. Tað eru góðar ættir og tað eru ringar ættir. Tað sjáldsama fyri Fuglafjørð og aðrar bygdir norðanfyri , er at høgættin er keðilig. Á hásumri kann tað verða sum ein vetrardag um hann er høgur. Lágættirnar eru hinvegin lýggjar og á einum summardegi við sól er tað næstan sum at verða á Hawaii.

Høgættirnar hava kava við sær og oftani nógvan kava samanborið við eitt nú Tórshavn. Lágættirnar eru hinvegin vátar.

Ringasta veðrið er tá hann kemur oman av Skarðinum. Hetta kann verða skaðaætt. Veðrið er eisini ymiskt alt eftir hvar tú ert í bygdini. Lágættirnar eru verri niðri í bygdini, meðan høgættirnar eru verri ovalaga í bygdini.

Fyri miðbýin og Havoy er tað serliga lágættirnar, sum tað skal takast hædd fyri og fyri høgættunum, sum koma oman av Skarðinum.
Omanfyri eru diagrammir sum vísa hvussu veðrið háttar seg. Aftast eru vindsimuleringar, sum vísa at sum heild er lívd, har tað skal verða.

Fyri lágættirnar er verjugarðurin og planting góð fyri mikroklimaði






Umkoyringartunnil og parkeringstunnil



65159

65159


Stemningur millum húsini á Havoy


Stemningur uttanfyri lestaríbúðir á Havoy


Bátahylurin




At búgva tætt við havið



Livandi lestrarbýur


Lestaríbúð